DAGSINS MEINING

Vísmannabólkur og Nor›urlond

Hesa vikuna hevur veri› fundur í Nor›urlandará›num. Umbo› fyri bæ›i landsst‡ri› og løgtingi› hava fylgt fundunum í Reykjavík. Á fundinum var› nógv gjørt burtur úr frágrei›ingini frá einum Vísmannabólki, har eisini Føroyar hava veri› umbo›a›ar. Umbo›i› fyri Føroyar hevur veri› Jóannes Dalsgaard, deildarstjóri í Mentamálast‡rinum. Eingin ivi er um, at hann er eitt gott val, tá hugsa› ver›ur um hansara royndir og áhuga fyri nettupp tí nor›urlendska. Sum politikari í mong ár vísti hann nor›urlendska samstarvinum stóran ans og vi› tilkn‡ti sínum til mentanarligt virksemi hevur Jóannes Dalsgaard eisini givi› nor›urlendska samleikanum gætur.

Frágrei›ingin frá Vísmannabólkinum fekk eina sera gó›a móttøku í Reykjavík. Ni›urstøan er tann, at nor›urlendska samstarvi› ongantí› hevur veri› so t‡dningarmiki› sum nú. Mælt ver›ur til, at Nor›urlond sláa manngar› um vælfer›arsamfelagi› og menna ta›. Nor›urlendska samstarvi› er ein ney›ug fortreyt fyri at var›veita vælfer›arsamfelagi› og fyri at var›veita ávirkan í heiminum. Ta› er ein fortreyt fyri at var›veita demokratii›, fyri at tryggja samstarv millum stór og smá lond og fyri at tryggja framhaldandi mentanarsamstarv. Vísmenninir vísa á, at bygna›urin fyri hesi samvinnu má eisini broytast og laga seg eftir tí ví›ka›a innihaldinum, sum bólk. Eisini ver›ur dentur lagdur á at taka størri ábyrgd av umhvørvinum í Nor›uratlantshavi. Nor›urlandará›i› skal eisini kunna venda sær beinlei›is til st‡rini í teimum einstøku londunum. Samfeløgini í Útnor›i koma eisini meira fram í hesi frágrei›ing.

Frá føroyskari sí›u ver›ur eisini roynt at menna og ví›ka um arbei›i› hjá Nor›urlandará›num. M.a. hevur føroyski rá›harrin í nor›urlandamálum, varaløgm›ur strí›st fyri, at sannføra hini nor›urlondini um at ví›ka samvinnuna til eisini og í størri mun at fevna um smáu oyggjasamfeløgini í Nor›uratlantshavi, her m.a. skotsku oyggjarnar og smáfeløgini á kanadisku Atlantshavsstrondini. Hetta er so eisini naka›, sum Vísmannabólkurin leggur stóran dent á.

Umframt at seta Nor›urlond meira í fokus sum eina eind og her ikki minst sæ› í relatión til umheimin, snú›i fundurin seg eisini um innanh‡sis menning í Nor›urlondum. Ta› var í hesum sambandi, at eitt føroyskt ynski var› gingi› á møti. Føroyar hava fingi› ein fastan lim í nor›urlendska mentanargrunninum og kann hetta fáa stóran t‡dning fyri føroyskt mentanarlív.

Sosialurin

NØVN Í VIKUNI

Gullbrúdleyp

Í morgin kunnu hjúnini Óluva og Elias Jacobsen vi› Gjónna á Strondum halda gullbrúdleyp og ta› merkir stutt, at tey hava veri› gift í samfull 50 ár.

Elias er ætta›ur úr lítlu bygdini Kollbeinagjógv, vestantil, innanfyri Raktanga og tvey tey fyrstu árini í hesum 50 ára hjúnalagi bú›u tey eisini í Kollbeinagjógv.

Óluva er ætta› úr Nólsoy og hon er dóttir Petru og Clæmint Jacobsen. Klæmint navni› fylgdi vi› inn á Strendur, tá elsti sonurin var› føddur og doyptur. Tey eiga f‡tra børn. Elst er dótturin Katrin, sí›an kemur Klæmint, Laura og Óli.

Elias sigldi sum ungur, men leg›ist uppi á landi, tá hann fekk starv sum sjafførur hjá nor›manninum Sverre Jørgensen, sum hev›i sítt virksemi í Havn. Seinni fór Elias at koyra fyri Kassamenninar á Strondum, eisini lastbil. Sí›an fór hann at arbei›a á Skála Skipasmi›ju og her koyrdi hann eisini strandingar, sum arbeiddu á Skála.

Óluva arbeiddi sum ung í Havn. Hon var í húspláss, arbeiddi eitt skifti á apotekinum og var eisini á Sjómansheiminum.

Me›an tey vóru forlova›i sigldi Elias úti. Hann sigldi vi› eini skonnart vi› frakt og skipi› kom eisini á Havnina. Tá var samskifti› ikki so gott sum í dag og ein morgun sær hon gjøgnum vindeyga í Hornabø skonnartina vi› bryggju. Drúgv tí› gekk og onki sást til Elias. Hon fór at ótolnast og ringdi heim á havnarskrivstovuna at frætta um skipi›. Gamli havnarmeistarin Sofus undra›ist á, at ein kvinna spurdi um tílíkt og svara›i álvarsamur: "Jú hetta er skipi› sum tygum spyrja um, men hvat eru ørindini, vilja tygun hava skipi› flutt?

Gullbrúdleypi› ver›ur hildi› í Pensionistahúsinum á Strondum.

je

Jústinus forma›ur

Á a›alfundi hjá Føroya Bla›mannafelag seinasta leygardag var Jústinus Eidesgaard, tí›indalei›ari á Sosialinum valdur til n‡ggjan formann.

Allir tríggir nevndarliminirnir løgdu frá sær á fundinum, sum tískil manna›i n‡ggja nevnd. Í gomlu nevndini sótu Randi Jacobsen, bla›kvinna á Dimmalætting, Sveinur Tróndarson, bla›ma›ur á Sosialinum og Ingun Olsen, sjónvarpskvinna.

Í n‡ggju nevndini eru umframt formannin, Jústinus Eidesgaard, Eli Guttesen, bla›ma›ur á Dimmalætting og Katrin Petersen, sjónvarpskvinna.

Jústinus Eidesgaard er 43 ára gamal, hann er ætta›ur úr Oyndarfir›i, sonur Leiv og Bodil Eidesgaard, sum bæ›i eru úr Oyndarfir›i.

Jústinus er útbúgvin bla›ma›ur frá Danmarks Journalisthøjskole í 1982. Á›renn hann fór ni›ur arbeiddi hann á Dagbla›num eitt skifti í 1976-77. Ári› eftir var hann til skips og koyrdi kravkúgv á Lambarei›i. Me›an hann var á skúla var hann í starvsvenjing á Thisted Dagblad og á Dimmalætting.

Li›ugur á skúlanum fór hann á Tingakross í 1982 og var har til hann í 1990 kom í starv her á Sosialinum. Hann hevur tó seinastu f‡ra árini veri› hjálparma›ur hjá prestinum í donsku sjómanskirkjuni, fyrst í Singapoore og sí›ani í Hamburg.

Jústinus er giftur Poulu,

fødd Simonsen úr Havn. Tey eiga hvør sítt barn, Poula 18 ára gamla Edvard og Jústinus 12 Fría.

Høvu›smálini, Jústinus ætlar sær í holtur vi› sum forma›ur í Bla›mannafelagnum, at at savna øll fjølmi›lafólk í Føroyum í eitt felag og at vinna teimum gó› eftirlønarvi›urskifti.

Treytir fyri valgreinar

Nú tí›in styttist til b‡- og bygdarrá›svali› 21. november, eru vit her á bla›num vi› at ganga undir í valgreinum. Hóast vit seinastu dagarnar hava prenta› fleiri sí›ur vi› valtilfari›, liggja framvegis um 75 greinar eftir.

Øll valevni eru kortini vælkomin at senda okkum tilfar, men vit kunnu kortini ikki lova, at tilfari› kemur í bla›i›, tá valevni ynskja ta›.

Fyri at bøta um henda trupulleika hevur bla›lei›slan gjørt av, at valtilfari› ikki skal fylla meira enn álei› eina A4 sí›u - ella umlei› 2.800 tekn. Saman vi› valgreinum kann prentast andlitsmynd av valevninum. Annar grafikkur ver›ur ikki tikin vi›.

Roknast kann ikki vi› at fáa valtilfar í leygardagsbla›i›.

Sosialurin

Sosialurin
Stovna›ur: 1927
Ábyrgdarbla›stjóri:
Jan Müller jan@sosialurin.fo
Bla›stjóri:
Eirikur Lindenskov eirikur@sosialurin.fo
Tí›indalei›ari:
Jústinus Eidesgaard justinus@sosialurin.fo

Markna›ardeild: lysing@sosialurin.fo
Jonhard Hammer jonhard@sosialurin.fo
Dagbjørt S. Hansen dagbjort@sosialurin.fo
Gudny Langgaard gudny@sosialurin.fo

Bla›fólk:
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Ey›un Klakstein eydun@sosialurin.fo
John Johannessen john@sosialurin.fo
Edvard Joensen edvard@sosialurin.fo
Turi› Kjølbro turid@sosialurin.fo
Stefan í Skorini stefan@sosialurin.fo
Sveinur Tróndarson sveinur@sosialurin.fo
Ítróttur:
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo
Myndamenn:
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo

Útgevari/uppseting:
Sp/f Sosialurin
Prent: Prentmi›stø›in

Avgrei›sla:
Mán.-frí. 8-16
Argjavegur 26,
Tel. 311820, Fax 314720
Postadressa:
Postboks 76, 110 Tórshavn
E-mail:
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo

Bla›i› ver›ur prenta›
mánadag-fríggjadag klokkan 14^{00}

L‡singar

Freistir:	Tekstl‡singar	Størri l‡singar	L‡singartorgi›	Heilsanir
T‡sdagsbla›i›	Mán.kl. 10	Frí. kl. 15	Frí. kl. 12	Frí. kl. 12
Mikudagsbla›i›	T‡s. kl. 10	Mán. kl. 15	Mán. kl. 12	Mán. kl. 12
Hósdagsbla›i›	Mik. kl. 10	T‡s. kl. 15	T‡s. kl. 12	T‡s. kl. 12
Fríggjadagsbla›i›	Hós. kl. 10	Mik. kl. 15	Mik. kl. 12	Mik. kl. 12
Leygardagsbla›i›	Frí. kl. 10	Hós. kl. 15	Hós. kl. 12	Hós. kl. 12

Størri l‡singar, sum nógv arbei›i stendst av, mugu vera inni í gó›ari tí› og á›renn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbi›jast í gó›ari tí›.

Stødd:
Ein heil sí›a í Sosialinum er 254mm brei› og 346mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39mm og rúmi› millum teigarnar er 4mm.

Ver við at bróta monopolið

"Vit hava brúk fyri dugnaligum og framsøknum persónum, ið vilja at átaka sær nýggjar og slóðbrótandi avbjóðingar. Vilt tú vera við, tá telefelagið Alnót fer at bróta monopolið, so er tað nú, tú skalt søkja starv hjá Alnót."

Telefólk
Telefólkið kemur at hava um hendi raksturin og fyrisitingina av teleswitch og neti t.d. ISDN, SS7, transmissión og multiplexing.

Tað er ein fyrimunur, um tú ert veikstreymsverkfrøðingur við praktiskum royndum innan fjarskifti.

IP-fólk
IP-fólkið kemur at hava um hendi dagliga raksturin og fyrisitingina av beinarum (routarum) og servarum.

Tað er ein fyrimunur, um tú hevur royndir við IP-neti t.d. frá netumsiting (MCSE) ella royndir hjá einum ISP'ara. Vit kundu hugsað okkum, at tú hevur viðkomandi útbúgving innan verkfrøði ella teldufrøði.

Marknaðarfólk
Marknaðarfólkið kemur at virka innan kundarøkt, vørumenning, marknaðarføring, sølu og vegleiðing.

Tað er ein fyrimunur, um tú hevur viðkomandi útbúgving og/ella royndir innan marknaðarføring.

Roknskaparfólk
Roknskaparfólkið kemur at hava ábyrgdina av bókhaldi, debitorumsiting, fíggjarstýring og avrokning.

Vit kundu hugsað okkum, at tú hevur royndir frá líknandi starvi, og at tú hevur útbúgving innan bókhald og fíggjarstýring t.d. HD, HA ella cand.merc. Tað er ein fyrimunur, um tú hevur royndir við bókhaldsforritinum Navision.

Skrivari
Skrivarin kemur at taka sær av skráseting, postavgreiðsla, kundaavgreiðslu og øðrum fyrifallandi skrivstovuarbeiði.

Vit kundu hugsað okkum, at tú hevur skrivstovuútbúgving ella líknandi førleika. Tað er ein fyrimunur, um tú hevur hollan kunnleika til skrivligt føroyskt, og hevur kunnleika til EDV á brúkarastigi.

Tað hevur týdning í øllum størvunum, at tú dugir at arbeiða sjálvstøðugt, hevur góð samstarvsevni og dugir væl enskt.

Lønin verður avtalað í hvørjum einstøkum føri grundað á útbúgving og royndir.

Møguleiki er fyri, at fleiri fólk verða sett á einstøku starvsøkjunum.

Vilt tú hava nærri at vita um størvini, kanst tú ringja til Terja Durhuus tekniskan ráðgeva á 225046 ella Bjarna Askham Bjarnason stjóra á 225085.

Umsóknirnar, ið verða viðgjørdar í trúnaði, skulu verða okkum í hendi í seinasta lagi 20. november 2000.

Umsóknirnar skulu sendast til:

Telefelagið Alnót pf.
Óðinshædd 2
Postsmoga 3299
FO-110 Tórshavn
bab@alnot.com

SAKGIR TEL 355 355

Alnót varð stovnað í 1999. Felagið fer í næstum við loyvi frá Vinnumálastýrinum at reka fjarskiftisvirksemi innan eittnú uttan- og innanlanda telefonitænastur.
Aðalendamálið hjá Alnót er at bjóða føroyingum fleiri og betri fjarskiftistænastur. Fyrsta stigið verður tikið til várs, tá vit fara at bjóða føroyingum tænastur innan internet og vanliga telefoni. Harumframt ætlar Alnót at bjóða føroyingum GSM tænastur einaferð í komandi ári.

Alnót

Telefelagið Alnót pf. Óðinshædd 2, Postsmoga 3299, FO-110 Tórshavn